Hanna Jensen
løgtingsmaður **Nr. 29/2020**

Fyrispurningur eftir tingskipanini §52 a

Fyrispurningur um ljóðbøkur, settur landsstýrismanninum við uttanríkis- og mentamálum Jenisi av Rana (at svara skrivliga eftir TS §52 a).

1. Verður arbeitt við eini tíðarhóskandi ljóðbókaskipan?
2. Um, ja, hvussu langt áleiðis er verkætlanin komin og nær væntast hon at vera tøk til borgaran at nýta?
3. Verða nóg nógvar føroyskar bøkur – bæði fagrar bókmentir, skúlabøkur og aðrar yrkisbókmentir - lisnar til ljóðbøkur?

Viðmerkingar:
Ein frágreiðing um ljóðbøkur "Ljóðbøkur í Føroyum 2018-2019" hevði m.a. hesar niðurstøður:

- at játtanin er ov lítil í mun til tørvin á ljóðbókum og í mun til málið um at koma upp á at framleiða 25% av øllum bókum, ið koma út um árið, sum ljóðbøkur
- at ljóðbókaformatið (fløgur), sum verður nýtt í løtuni, ikki er tíðarhóskandi
- at føroyskar ljóðbøkur fáa harða kapping frá umfatandi útlendskum tilboðum um lætt atkomuligar ljóðbøkur

Harumframt eru m.a. avbjóðingar nevndar fyri fólk við serligum tørvi, at fáa atgongd til ljóðbøkur eins og um sáttmálaviðurkskifti og avtalur, sum ljóðbókaskipanin skal byggja á.
Nú farsóttin hevur elvt til, at mong hava verið í sóttarhaldi, at gerandisdadgurin hjá føroyingum í stóran mun er merktur av umstøðunum, so er tað vorðið enn meiri greitt, at tørvurin á føroyskum ljóðbókum er ovurstórur og at atkomuligheitin als ikki er tíðarhóskandi.
Í áður nevndu frágreiðing eru 10 tilmæli, sum kunnu vegleiða landsstýrinum at menna hetta virkisøki. Tilmælið um at frítaka ljóðbøkur fyri mvg og harvið javnseta tær við prentaðar bøkur varð sett í verk í 2019.
Nú frálíka átakið "Føroyar lesa" er farið av bakkastokki, er tað sera umráðandi, at vit fáa eina tíðarhóskandi ljóðbókaskipan og at ljóðbókaskipanin fær betri rásarúm – bæði viðvíkjandi tøkni og í mun til, hvussu nógvar bøkur verða ljóðbøkur
Tí verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi 9. oktobur 2020

Hanna Jensen